## Roykibann á flogvøllinum

Frá 1. februar verður fullkomið roykibann sett á Flogvøllinum. Hesum hevur Vága Floghavn boðað frá í tíðindaskrivi. Í tubbakslógini verður sagt, at endamálið við hesi er, at tryggja øllum rættindi til eitt roykfrítt umhvørvi og at seta í verk tiltøk, sum minka um skaðarnar, ið standast av ubbaksnýtslu. Við hesum í huga hevur leiðslan á Flogvøllinum gjørt av, at seta roykibann í gildi. Umstøðurnar við Flogvøllin geva ikki rúm fyri at gera serskilt roykirúm, og tí mugu roykjarar frá hósdegnum í komandi viku at rokna útum, um hesi vilja festa sær í.

## Hanus í Leikalund



Hóskvøldið fer Hanus G. Johansen at framføra tónleik av nýggju fløguni "Frå Leddiken" í Leikalund í Klaksvík. Hetta er fyrsta ferðin, at Hanus fer á pall í Føroyum við løgum av nýggju útgávuni. Allir tekstirnir á fløguni eru skrivaðir av norska yrkjaranum Jakob Sande sála. Útgávan hevur fingið framúr ummæli í bæði Føroyum og Noreg, og ummælini vóru ikki minni positiv, tá Hanus hevði konsertir í Noreg fyri jól. Konsertin hóskvøldið verður klokkan 20.

## Jógvan í Mentanar-grunnin

**Á ársfundi Norðurlandaráðsins í 2006 varð Jógvan við Keldu valdur sum føroyskt umboð í Mentanargrunn Norðurlandaráðsins fyri tíðarskeiðið 2007 – 2008**

POLITIKKUR
*tíðindaskriv*

Jógvan við Keldu hevur áður sitið í stýrinum fyri Mentanargrunni Norðurlandaráðsins og varð valdur í 2002 fyri tíðarskeiðið 2003 – 2004. Hann sat tó ikki alt tíðarskeiðið tá, tí hann gjørdist landsstýrismaður í 2004, og tók tá Óli Breckmann yvir sessin.

Í tíðarskeiðnum 2005 – 2006 hevur Jóannes Dalsgaard, deildarstjóri í Mentamálaráðnum, sitið í stýrinum fyri Mentanargrunn Norðurlandaráðsins.

Mentanargrunnur Norðurlandaráðsins er settur á stovn við sáttmála millum limalondini í Norðurlandaráðnum. Hesin sáttmáli varð undirskrivaður í 1966 og grunnurin fór undir virksemi sítt 1. juli 1967.

Endamálið hjá Mentanargrunni Norðurlandaráðsins er at fremja mentanarligt samstarv millum Danmark, Finnland, Ísland, Noregi og Svøríki, og Føroyar, Grønland og Áland. Mentanargrunnurin býtir út árliga 25 mió.kr. til at stuðla mentanartiltøkum. Treytin er, at hesi tiltøk skulu umfata í minsta lagi trý norðurlendsk lond.

Varamaður fyri Jógvan við Keldu er Kári P. Højgaard.

# 23.000 málarar skulu skiftast

**Tíðin tá fólk frá SEV pikkaðu uppá dyrnar er skjótt farin. SEV tekur í brúk nýggja tøkni, og øll skulu hava nýggjan el-málara**

SEV-MÁLARAR
*Gunnar Skúvadal*
*gunnar@sosialurin.fo*

Nýggja skipanin fer at lætta um hjá SEV. Men hon fer eisini at geva brúkaranum eina el rokning, sum er meir í tráð við nýtsluna sum hon er beint nú, og ikki fyri einum ári síðani, sum tað er í dag.

– Skipanin hevur verið royndarkoyrd í tvey ár, og úrslitini eru so mikið góð, at vit hava tikið avgerð um, at allir 23.000 málararnir í landinum skulu skiftast út við teir nýggju, sigur Klæmint Weihe, stjóri.

Sum tað er í dag, rindar brúkarin akonto gjøld, alt eftir hvussu nýtslan hevur verið árið frammanundan. Tað gevur ikki altíð røttu myndina, tí nýtslan kann broytast, og so fær kundin eina eykarokning ella eina upphædd góðskrivaða, tá árið er liðugt. Nýggju málararnir gera tað møguligt at lesa nýtsluna av alla tíðina, og soleiðis kann kundin fáa eina rættari rokning.

### Krav í øðrum londum

Nýggja slagið av málarum er blivið lutfalsliga nógv bíligari tey seinastu árini. Og tað hongur saman við, at tað nú er krav í fleiri londum, at nýtslan skal kunna lesast av alla tíðina. Tað kemst av, at fleiri el-veitarar eru, og tá kundin ynskir at skifta veitara, skal nýtslan kunna gerast upp skjótt. Í dag kosta nýggju málararnir umleið 1000 krónur, men fyri bara tveimum árum síðani var prísurin fýra ferðir ta upphæddina.

– Tí hevur SEV bíðað eftir rætta prísinum, áðrenn avgerð er tikin um at skifta, sigur Klæmint Weihe. Eini 200 fólk kring landið hava havt til uppgávu at lesa av málararnar. So hvørt sum teir nú verða skiftir, verða hesi fólkini ikki biðin aftur.

### Fleiri upplýsingar

Nýggja slagið av málarum gevur eisini fleiri upplýsingar enn teir gomlu, sum nú verða brúktir. SEV kann eitt nú fáa upplýsingar um spenningsviðurskifti hjá brúkaranum og fleiri aðrar tekniskar upplýsingar sum kunnu brúkast, tá netið skal haldast viðlíka, umframt upplýsingar um, hvussu nógvan streym húsarhaldið brúkar.

SEV hevur sett av 2,5 milliónir krónur til endamálið í ár. Men tað fer væntandi at taka eini 10 ár, áðrenn tann seinasti málarin, sum krevur manuellan avlestur, er skiftur um við ein nýggjan sjálvvirkandi.

– Kundin merkir onki til útskiftingina, SEV eigur málararnar, og rindar eisini fyri teir nýggju, sigur Klæmint Weihe.



*SEV fer komandi árini at skifta út 23.000 el-málarar - og rindar útreiðslurnar*
*Mynd: Álvur Haraldsen*

# Rann undan løgregluni

Seinnapartin í gjár kom løgreglan í Havn fram á ein mann sum koyrdi uttan koyrikort á Skálatrøð.

Tað eydnaðist kortini ikki løgregluni at fáa fatur á manninum, ið tók til rýmingar.

– Vit hava sæð mannin, og vit vita eisini hvør hann, verður sagt av Politistøðini í Havn.

Tá maðurin sá løgreglubilin rann hann oman til bátabrúgvarnar, har hann krógvaði seg – og hvarv!

Hóast væl varð leitað, bæði millum bátarnar, og minst í fleiri av bátunum, funnu teir ikki mannin tá.

Men eingin ivi er um, at maðurin ikki sleppur undan ákæru. Hann fær heilt vist vitjan av løgregluni einaferð seinni.

**sb.**



*Hundaløgreglan var av tilvild nærhendis Skálatrøð, og luttók í leitingini eftir burturslopna manninum*
*Mynd: Jens Kr. Vang*